## Rooney rundaði 100

Álopsspælarin Wayne Rooney skrivaði seg um vikuskiftið í søgubøkurnar hjá Manchester United, tá hann skoraði mál nummar 100 fyri felagið. Rooney er spælari nummar 20 í søguni, sum hevur skotið hundrað mál fyri United. Rooney skoraði tvey mál, tá Manchester United vann heili 5-0 á Wigan í Premier League leygardagin.



## West Ham spælari stungin niður

Verjuspælarin Calum Davenport, sum spælir fyri West Ham, var fríggjanáttina stungin niður í heimi í sínum. 26 ára gamli Davenport var staddur heima saman við mammu síni, og tey vórðu bæðin stungin av knívi. Ringast gekk tað út yvir Davenport, sum varð lagdur undir skurð á sjúkrahúsi, og sagt verður, at hann er heppin at verða á lívi. Eftir øllum at døma var ein uppgerð millum ein familjulim og eitt vinfólk orsøk til tilburðin.

# FSF bar próvbyrðuna hjá B36

**Hóast upprit frá sakførara staðfesti, at B36 ikki hevur grundgivið fyri, hví talan er um heilt serligt føri, so valdi Kappingarnevndin hjá FSF at bólka flytingina av spæliloyvinum hjá Christiani Restorff Mouritsen undir »heilt serligt føri«. Próvbyrðan fyri at heita á FSF um at gera undantak, verður soleiðis borin av – FSF**




Jákup Mørk



Kappingarnevndin gjørdi av at nýta serligu regluna frávik grundað á heilt serliga støðu, tá spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen varð flutt til B36. Tað løgna er tó, at B36 ongan tíð søkti um at nýta henda serliga part av reglugerðini
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Tá Kappingarnevndin hjá FSF fríggjakvøldið gjørdi av, at spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen skuldi flytast úr HB til B36, hóast B36 var ov seint at søkja um leysgevingina, var talan um ógvuliga kontroversiellan dóm.

Grundgevingin hjá Kappingarnevndini var, at bæði FSF- og UEFA-reglur geva møguleika fyri at gera undantak frá meginregluni um flytingarvindeyga, og at tað var einki í altjóða reglunum, sum forðaði FSF í at gera nýtslu av hesum undantakinum.

Hartil førdi B36 fram, at talan var ikki um nakra dulda ætlan, tí hóast FSF ikki hevði fingið umbøn um flytan at spælaraloyvinum, so hevði spælaraskiftið verið frammi í almenna rúminum, longu tá hetta varð veruleiki tann 6. juli.

### Stór men

Men men'ini eru bæði nógv og stór, nú avgerðin er tikin.

Ein partur av grundarlagnum undir avgerðini var eitt løgfrøðiligt upprit, og í sjey síður langa uppritinum er serstakliga trupult at finna nakra sum helst grundgeving fyri, at B36 skuldi fáa undantak frá regluni.

Fyrst og fremst er vert at bíta merki í, at vanlig siðvenja hjá FSF í ivamálum er at spyrja fyrisitingarnar í hinum Norðanlondunum um, hvør teirra støða vildi verið. Tað er eisini gjørt hesaferð, men í svarskrivum sínum gera íslendska, danska, norska og svenska fótbóltssambandið greitt, at tey ikki vildi loyvt frávik í málum av hesum slag.

Sakførarin vísir annars á, at grein 6, petti hjá 1 hjá FIFA í reglunum um spælaraflytingar, staðfestir, at eru felagið og spælarin samd um, at sáttmálin verður uppsagdur í úrtíð, so kann hetta koma undan undantøkini, sum eru serlig.

Gjørt verður tó í hesum sambandi vart við, at talan her er um ein møguleika og ikki eina skyldu, sum einstøku fótbóltssambondini hava. Og tað verður eisini gjørt greitt, at um undantakið skal nýtast, so eigur ítróttarliga ávirkanin av hesum at vera gjølliga umhugsað, eins og greiðar formligar reglur skulu gerast fyri, nær slíkt undantak kann nýtast. Slíkar reglur hevur FSF ikki, og tað er eingin sum helst ivi um, at talan ítróttarliga er um spælara, sum kann fáa avgerandi ávirkan á botnstríði í Vodafone-deildini. Í øllum førum, um útsagnirnar hjá B36-venjaranum dagin fyri avgerðina hjá Kappingarnevndini, skulu takast til eftirtektar.

Samstundis vísir sakførarin á, at B36 í ongum føri hevur undirbygt, hví málið viðvíkjandi Christiani Restorff Mouritsen skal fella undir heilt serligt føri ella greiða misskiljing. Og tað verður staðfest, at hóast eitt slíkt forgloymilsi er óheppið fyri einstaka spælaran, so verður talan ikki um serligt føri fyri tað. Hetta tí slíkt mistak altíð vil vera óheppið fyri óseka spælaran, sum verður raktur.

### FSF punkterar seg sjálvt

Hóast niðurstøðan ikki umfatar eitt greitt ja ella nei, so er eingin sum helst ivi um, at talan er um ein juridiskan trupulleika, sum Kappingarnevndin fríggjadagin gav FSF.

»Um ikki ógvuliga góðar góðar grundir tala fyri at geva eitt undantak, má tað mælast frá, at at undantak verður givið – ikki minst so leingi, sum einsljóðandi reglur fyri slíkum undantøkum ikki finnast«.

Soleiðis ljóðast triðju seinasta reglubrotið í frágreiðingini, og tá ber illa til at siga annað, enn at Kappingarnevndin átti at traðka ógvuliga varliga, áðrenn hon kolldømir eina avgerð, sum nevndin longu hevur tikið einaferð.

Og at enda, staðfestir sakførarin beinleiðis, at FSF væl kann hava punkterað sínar egnu reglur, um undantak verður givið. Hetta tí tað í prinsippinum kann føra til, at FSF ikki framyvir á sama hátt kann tvíhalda um, at endatíðarfreistin í flytingarglugganum at lata inn loyvisbræv og spælarasáttmálar í líknandi málum skal haldast, og fer tað í so fall at bera til hjá feløgum og spælarum at spekulera í, ikki at halda endatíðarfrestirnar í flytingarglugganum.

## Skeivur sáttmáli góðkendur

Tað verður ikki tikið atlit til tað í niðurstøðuni hjá advokatinum, sum FSF bað um at kanna málið viðvíikjandi Christiani Restorff Mouritsen. Men av skjølunum framgongur, at sáttmálin, sum varð sendir til góðkenningar, als ikki er tann sáttmálin, sum B36 sigur seg hava gjørt almenninginum greitt, at spælaraskiftið var veruleiki.

Tað var nevnliga tann 6. juli, at B36 á heimasíðu sínari staðfestir, at felagið hevur skrivað sáttmála við Christian Restorff Mouritsen.

Hesin sáttmálin varð ongantíð latin FSF til góðkenningar, hóast hetta átti at verði gjørt í seinasta lagi tann 13. juli. Altso eina viku eftir, at sáttmálin varð undirskrivaður.

Ístaðin fær FSF tann 30. juli, sum er fyrsti arbeiðsdagur eftir ólavsøku, ein sáttmála, sum er dagfestur, 6. juli, men sum FSF ikki kann góðtaka, tí skeivur sáttmáli er brúktur, B36 kemur síðan við nýggjum sáttmála og er hesin dagfestur 27. juli (enntá í 2010!). Ein av høvuðsgrundgevingum hjá Kappingarnevndini í málinum er annars, at tað í góðari tíð – altso langt áðrenn flytingargluggin lat aftur – var greitt, at spælarin skuldi skifta felag. Og tað má tí sigast at vera eitt sindur merkisvert, at sáttmálin, sum nú liggur sum grundarlag fyri givna undantakinum, er undirskrivaður á seinasta degnum, sum flytingargluggin var opin.

*-mørk*